**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 4/2026: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um at menna nýggja kt-skipan til barsilsskipanina** (Hækka upphæddina og leingja gildistíðina)

Landsstýriskvinnan í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá, hevur lagt málið fram 3. august 2026, og eftir 1. viðgerð 5. august 2026 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 20. august 2026.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við landsstýriskvinnuna í almanna- og bústaðamálum, Margit Stórá, saman við TAKS.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Endamálið við uppskotinum er at hækka upphæddina og leingja tíðarfreistina í verklagslógini um at menna eina nýggja kt-skipan til barsilsskipanina.

TAKS hevur í eina tíð arbeitt við at menna eina nýggja kt-skipan, og sambært løgtingslóg nr. 28 frá 1. mai 2024 kunnu í mesta lagi 11 mió. krónur brúkast til endamálið, og heimildin er galdandi til 1. januar 2027. TAKS hevur síðani boðað Almanna- og bústaðamálaráðnum frá, at tað verður neyðugt at tillaga fíggjar- og tíðarætlanina. Skotið verður upp at hækka upphæddina í verklagslógini úr 11 mió. krónum upp í 13,5 mió. krónur og at leingja gildistíðina við einum ári.

Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, at tað er sera átrokandi at fáa eina nýggja kt-skipan til barsilsskipanina, millum annað tí at verandi skipan er somikið gomul, at tað er trupult at finna kt-fólk, ið kenna til hana og kunnu veita tænastur.

Fíggjarnevndin hevur sett nógvar spurningar við tað, at skipanin nú kostar meira enn upprunaliga mett, serliga tí at upplýst varð fyri Løgtinginum, tá arbeiðið byrjaði, at arbeiðið varð boðið út fyri eina fasta upphædd, og at meira fór ikki at verða gjørt, enn tað sum játtanin rakk til.

Til hetta fekk Fíggjarnevndin at vita, at fleiri orsakir vóru til íkomnu støðuna. Millum annað vórðu fleiri lógarbroytingar gjørdar í barsilsskipanini, meðan arbeiðið var í gongd, og eingir pengar vórðu játtaðir til at fáa hesar broytingarnar við í arbeiðið. Eisini fekk nevndin upplýst, at hóast arbeiðið varð boðið út, so mátti Elektron vera við í arbeiðinum, tí tað er har, ið verandi skipan liggur. Onkur partur varð boðin út, men í tí førinum var tað tímaprísin, ið kappast varð um. Teir prísirnir halda framvegis, men brúk er fyri fleiri tímum. Tað ber til at steðga arbeiðinum nú, men so manglar ein fyrimunur, sum kann fáast, og skipanin verður tyngri at umsita.

Fíggjarnevndin heldur, at hóast íkomnu støðuna, so er rætt at gera arbeiðið liðugt, og tí tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 26. august 2026**

| | | |
|---|---|---|
| Helgi Abrahamsen<br>formaður | Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur<br>næstforkvinna | Bill Justinussen |
| Bjarni Hammer | Eyðgunn Samuelsen | Sirið Stenberg |
| | Ruth Vang | |